Agnar Joensen:

# – Alt ov nógv hvílur á Inga

**Strikuspælarin Agnar Joensen hjá VÍF helt eftir dystin fyri, at tað er ov galið, at eitt lið skal standa og falla við einum manni**

STEYPAPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Agnar Joensen stóð eitt sindur burtur frá fjøldini og eygleiddi teir fengu strandingar, tá ið vit fingu orðið á hann eftir steypaósigurin leygardagin.

Spurdur, hvussu tað ber til, at álopsspælið hjá VÍF fullkomiliga fellur saman, tá ið Ingi Olsen fer av vøllinum, sigur hann:

– Eg veit ikki. Ingi er so nógv tann besti spælarin í Føroyum, men tað er nógv for galið, at tað skal hvíla so nógv á einum spælara, tí hann blívur ikki við at spæla, so onkur má koma í hansara stað. Áki G. tók yvir, men hann noyddist eisini út við skaða eina løtu, so hetta var bara ikki okkara dagur, sigur Agnar.

Spurdur, hvørja ávirkan steypaósigurin fer at hava á landskappingina, sigur Agnar.

– Eg vóni og vænti ikki, at tað fer at hava nakra ávirkan á okkum, men tað vil tíðin vísa. Vit ætla okkum so meistaraheitið, og vit skulu nokk koma sterkt aftur, sigur Agnar Joensen.

Dia Midjord:

# - Vit komu ikki í gongd

**Venjarin hjá VÍF, Dia Midjord, var sera vónbrotin um steypaósigurin, og hann vil ikki brúka missin av Inga Olsen sum orsøk til ósigurin**



STEYPAPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Dia Midjord og hansara monnum í VÍF at vinna steypafinaluna leygardagin, og tað harmaði venjaran almikið.

Vit spurdu Dia, hví VÍF ongantíð av álvara fekk spælið hjá sær at koyra.

– Eg veit ikki heilt. Vit missa Inga, men vit eiga at kunna spæla okkara spæl uttan hann. Vit standa ikki nóg væl í verjuni, og teir koma til alt ov nógv bílig mál, sum teir ikki skulu fáa, sigur Dia Midjord.

Ofta verður sagt, at málverjarnir hava stóran týdning í einum dysti, og hetta helt Dia eisini var galdandi í finaluni leygardagin.

– Marian stendur ein fantastiskan dyst í málinum hjá teimum, og hann hevur fleiri bjargingar, tá ið vit annars eru um at fáa fatur á teimum aftur. Samstundis haldi eg ikki, at okkara málverjar standa meiri enn ein miðal dyst, og tað kann verða munurin millum tvey lið, sigur Dia Midjord.

# StÍF er steypal

**Enn einaferð prógvaðu strandingar, at teir eru steypaliðið burturav í føroyskum manshondbólti, tá ið teir leygardagin vunnu uppibornan sigur á VÍF, sum ikki megnaði at fáa glið á spælið hjá sær uttan Inga Olsen**

STEYPAFINALA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið helt onkur skemtandi fyri, at spurningurin var, um StÍF stóð fyri Stranda Ítróttarfelag ella Steypaliðið Í Føroyum, og tað kann tað verða nakað um. Strandingar vístu nevnliga í finaludystinum móti VÍF, at tá ið talan er um sonevndar alt ella einki dystir, eru teir altíð drúgvir.

## Stýrmaðurin reyk

Undan steypafinaluni høvdu liðskipararnir hjá hinum fýra liðunum í bestu mansdeildini í hondbólti allir peikað á Inga Olsen, tá ið teir vóru spurdir, hvør var lyklaleikarin hjá VÍF. At liðskipararnir høvdu grein í sínum máli, er lítið at ivast í, og finaludysturin leygardagin man verða eitt gott prógv um hetta.

Tað var nevnliga so, at vestmenningar vóru so mikið óhepnir, at ein skaði í økslini, sum Ingi hevði fingið í dystinum móti Kyndli fyri góðari viku síðani, stakk seg upp aftur, og stýrmaðurin hjá VÌF noyddist tí út, longu tá ið sjey minuttir vóru leiktir av dystinum. Hóast dúgliga var roynt at fáa Inga kláran aftur, so var einki at gera, tí Ingi hevði onga føling í høgra armi.

Missurin av Inga var ein dyggur smeitur fyri vestmenningar, sum ongantíð fingu álopsspælið hjá sær at koyra móti offensivu verjuni hjá strandingum. StÍF vardi sera offensivt við einum Paula Hansen liggjandi frammi á spælskiparanum og Bent Djurhuus var langt frammi á Sámal Joensen hjá VÍF á vinstra bakki. Júst móti slíkum offensivum verjum er Ingi gull verdur, tí at hann hevur so gott hegni til at finna smá hol í verjuni hjá mótstøðuliðnum og spæla viðleikarar leysar.

Áki G. Olsen er mest náttúrligi avloysarin hjá Inga á stýrmansplássinum, men fyri at gera ilt verri, so fekk hann eisini ein snudd í finaludystinum, og hann var leingi uttan fyri vøllin.

## Einfalt álopsspæl

Í hinum endanum av vøllinum var meiri bit í álopsspælinum hjá strandingum. Við rættuliga einføldum álopsspæli lirkaðu strandingar tunnu verjuna hjá vestmenningum upp. Pauli Hansen, sum var spælskipari, sendi til annan av bakkunum, og fór síðani inn mitt í verjuna hjá VÍF, har hann saman við strikuspælaranum Bent Djurhuus screenaði miðverjuna hjá VÍF, so at eitt glopp bleiv til tann av bakkunum, ið fór upp til skot. Tá ið so havt verður í huga, at bakkarnir hjá StÍF eita ávíkavist Sveinur og Leivur Justinussen, so vita tey flestu, at fáa teir pláss og tíð at skjóta, so situr bólturin í allarflestu førum í netinum. Sum áðurnevnt var verjan hjá VÌF rættuliga tunn leygardagin, og tá ið so er, kann tað verða trupult at verða málverji. Hetta sást eisini aftur í finaluni, har teir báðir VÍF-málverjarnir, Dejan Lacok og Eli Müller, ongantíð komu í gongd í dystinum. Tað verður mangan tikið til, hvussu stóran týdning málverjin hevur, men fyri at málverjin skal koma í gongd, er neyðugt, at hann fær stuðul



# Ingi kanska spælt sín síðsta dyst

**Teir sjey minuttirnir, ið Ingi Olsen fekk á vøllinum í steypafinaluni leygardagin, vóru kanska teir seinastu hjá honum á besta liðnum hjá VÍF. Undir øllum umstøðum er ikki væntandi, at Ingi verður aftur á vøllinum í á**

HONDBÓLTSSKAÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ingi Olsen er uttan iva besti hondbóltsspælarin, ið føroyingar hava fostrað seinastu mongu árini. Spælskiparin hjá VÌF í ein mansaldur tykist framvegis ikki at hava nakrar trupulleikar at verða í serflokki í bestu mansdeildini, men ein álvarsligur skaði í økslini hevur nú kanska við sær, at Ingi noyðist at siga hondbóltinum farvæl.

## – Kanska ikki mín avgerð

Ingi fekk ein skaða í økslina í landskappingardysti móti Kyndli fyri góðari viku síðani, og hóast hann tóktist klárur til finaluna, so gjørdist skaðin verri í finaludystinum.

Tá ið vit tosaðu við Inga mánamorgunin, greiddi hann frá, at tað stóð einki til við skaðanum.

– Eg fái ikki lyft armin, og eg eri bangin fyri, at tað